# Terji gevur fyrstu LP'ina í 15 ár út

**Aldarinnar tónleikaútgáva í farnu øld sambært Sosialinum, Terji og Føstufressar, verður nú aftur at fáa sum LP. LP'in hevur verið útseld í handlunum í nógv ár. Men frá nú fæst Terji og Føstufressar aftur at leggja undir nálina.**

**Tónleikaútgáva**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Terji Rasmussen gevur í hesi vikuni 200 eintøk av LP'ini Terji og Føstufressar út, og hetta er fyrstu ferð ein LP kemur út í Føroyum í 15 ár. Hetta hendir umleið eina viku áðrenn, 200 koma við sínari LP útgávu av Viva La Republica, ið ætlandi skuldi verða fyrst LP útgáva í 15 ár.

Terji greiðir frá, at hann átti 200 eintøk av LP'ini, sum ongantíð vóru farin í handlarnar. Tá útvarpið nú valdi Føstufressar plátuna sum ein varða á leiðini, og tosið um stóran áhuga fyri LP plátum hoyrdist, var upplagt at geva tær út. Terji sigur ,at hann hevur valt at seta prísin lágt á LP'unum, ið einans kosta 99 kr. Hetta er jú ein endurútgáva av eini gamlari plátu. Eg síggi hetta, sum ein møguleika lata teimum, ið eru LP fjepparar sleppa at hoyra hesa plátuna. LP'in fæst einans í 3'aranum.

Útgávan hjá Terja og Føstufressum kom út fyrstu ferð fyri júst 15 árum síðan, og var sostatt ein tann síðsta LP'in, ið kom út, áðrenn fløgurnar veruliga tóku yvir. Útgávan hjá Terja er ein av mest seldu føroysku tónleikaútgávunum og varð í atkvøðugreiðslu, ið Sosialurin skipaði fyri um aldarskiftið, skírd aldarinnar pláta.



### Barnadreymur gjørdist fólkaogn

Terji greiðir frá, at útgávan einki serligt seldi í fyrstuni. Har var ikki nakað veruligt hitt. Tónleikurin er einfaldir melodiir, útsettir fyri jassarrangementir. Hetta riggar væl. Terji hevði tá í nøkur ár verið limur í Frændum, men valdi heldur at gera fløguna saman við Plúmmarunum, tí teimum hevði hann spælt nógv saman við.

Teir høvdu tá bert einaferð verið í upptøkuhøli, tað var í samband við Ung '85 plátuna. So teir høvdu nógv at prógva. Terji kastaði løgini fyri teir, uttan at tey vóru løgd til rættis, og saman skaptu teir plátuna. Terji heldur, at hetta konsept skapti tíðarleysan tónleik, og tað er orsøkin til, at útgávan blívur við at selja væl.

Kendi danski saksofonleikarin Holger Laumann luttók á fløguni, og sambært Terja metir Holger hesa fløgu vera millum tær bestu útgávurnar, ið hann hevur luttikið á. "Hann hevur hana altíð í taskuni, og spælir hana fyri fólki kring allan heim, og fær altíð sama spurning, hvar í heiminum spæla tey sovorðnan tónleik" sigur Terji.

Eisini yrkingarnar eru tíðarleysar, nógv er støðulýsingar, og tær eru líka sigandi í dag, sum í 1990. Terji sigur, at tað var ein barnadreymur at geva sína egnu plátu út, og tað er stuttligt, at hon hevur selt so væl, og hevur fingið so nógvan heiður.

# Miðlarnir fylgdu við í GBOB

**Føroyski miðlaheimurin gjørdi nógv burtur úr GBOB og var væl umboðaður á finaluni í London. Føroyski fyriskiparin helt hetta vera sera flott.**

**GBOB**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroysku fjølmiðlarnir vóru væl umboðaðir í London, tá Marius luttóku í finaluni í The Global Battle Of The Bands. Einans Filipininar høvdu nøkurlunda líka góða fjølmiðla luttøku. Umframt Sosialin og Planet.fo var Dimmalætting og Kringvarpið í London. Kringvarpið var umboðað av bæði sjónvarpi og útvarpi. Sjónvarpið hevði tveir mans við í London. Tróndur Vatnhamar og Thomas Koba runnu í hølunum á Marius fá mánadegnum, til teir aftur vóru í Føroyum hósdagin. Hetta verður eftir ætlan ein sending í SVF í komandi viku.

### Útvarpið var væl mannað

Elis Poulsen og Kári Sólstein umboðaðu Útvarp Føroya á GBOB. Fólkakæru morgunvertarnir sendu beinleiðis mikukvøldið og prátaðu millum annað við fleiri av føroysku áhoyrarunum. Saman við tøkninginum Hjalmari Hvítklett góvu teir á hendan hátt føroyska útvarpslurtaranum møguleika at fylgja við í, hvussu leikur fór í London. Tíanverri gekst heldur striltið at taka tónleikasignalið niður í Føroyum, og tí noyddust teir báðir at stríðast fyri at fylla sendingina út við nógvum prátum. Men hetta gekk bara heilt væl.

Elis hevur meistarlig evni til at sannføra fólk um, at tey skulu í útvarpið, og hetta gjørdi, at fleiri av teimum eitt sindur ivasomu útisetunum, at enda glaðbeintir komu í útvarpið, hóast tey ikki vildu í byrjanini.




Umframt at senda av GBOB sendu Kári, Elis og Hjalmar morgunsendingina mikudagin og hósdagin úr London, har nógvir føroyskir útisetar vitjaðu í sendingini.

### Dámar allan tónleik

Eg spurdi Elis, ið best er kendur fyri dansband tónleik, um hvussu tað var at lurta eftir so nógvum rokki so nógvar tímar á rað. Hann lat væl at og segði, at hon um dámdi so nógvan ymiskan tónleik, og ofta lurtaði eftir hørðum rokki. Sonur hansara er trummuleikari sum Elis sjálvur og hann lurtar nógv og hart eftir hørðum rokki, so hetta var ikki so óvanligt.

Elis var sum restin av føroyska ferðalagnum sera væl nøgdur við framførsluna hjá Marius. Hann helt tað vera øgiliga stuttligt at síggja, hvussu væl Føroyar kláraðu seg sammett við allar hesar nógvu stóru tjóðir.

Umframt føroysku framførsluna helt hann Feliz No Cumpleanos úr Meksiko vera sera spennandi, og helt sum heild, at hetta var ein frálíkur sýnisgluggi hjá føroyskum tónleiki.

### Sjónvarpið í hølunum

Mikudagin millum ljóðroyndina og sjálva konsertina var eg ein túr í býnum við limunum í Marius og Sjónvarpsmonnunum. Vit vitjaðu í ymiskum tónleikahandlum í London. Eg prátaði eitt sindur við Trónd Vatnhamar meðan vit gingu í hølunum á Marius. Hann greiddi frá, at teir høvdu fingið góðar stuðlar á sendingina og soleiðis bar hetta til. Hann segði, at teir longu áðrenn konsertina høvdu tikið nógvar tímar av tilfari upp, men teir ætlaðu at klippa tilfarið so skjótt sum tilber, soleiðis at sendingin kann koma í sjónvarpið sum skjótast.

### Fyriskipari væl nøgdur

Jón Tyril føroyski fyriskiparin av GBOB, segði við Sosialin at hann var sera væl nøgdur við, at føroysku miðlarnir høvdu sýnt tiltakinum so nógvan ans. Hann helt tað vera flott, at eitt so lítið land sum Føroyar var millum best umboðaðu londini á fjølmiðlaøkinum.